Ivan Johansen Bilar, Dinitrol:

# Rustviðgerðin góðkend av Teknologisk Institut og FDM

**Ivan Johansen Bilar var fyrsta fyritøka sum tók sær av at rustviðgera bilar í Føroyum tíðliga í sjeytiárunum. Fyritøkan hevur gingið á odda innan hetta økið øll árini við dagførdum amboðum og nútímans hølisviðurskiftum til rustviðgerð**

**BILRØKT**




*Kaj Boetius stendur fyri rustviðgerðini hjá Ivan Johansen Bilum. Kaj hevur luttikið á skeiðum fyri sproytuoperatørar hjá Teknologisk Institut í Danmark og fingið besta karakter fyri sítt arbeiði*

Livitíðin hjá einum bili er sum oftast treytað av hvussu væl rustviðgjørdur hann er, sigur

Kaj Boetius, sum stendur fyri rustviðgerini hjá Ivan Johansen Bilum. Kaj hevur drúgvar royndir við at rustviðgera bilar. Hann er útbúgvin sertifikatsveisari, og hevur luttikið á skeiðum fyri sproytuoperatørar hjá Teknologisk Institut í Danmark.

Kaj sigur, at bilar sum verða rustviðgjørdir hjá P/F Ivan Johansen Bilar verða eftirhugdir og kannaðir av Teknologiskt Institut á hvørjum ári, og afturvendandi niðurstøðan er, at arbeiði er væl úr hondum greitt.

Tað er Dansk Teknologisk Institut sum stendur fyri hesum eftirkanningunum, ið kallast VKO-R (Værksteds Kontrol Ordning vedrørende Rustbeskyttelse). Dinitrol rustviðgerðin er góðkend av Teknologisk Institut og verður tilmæld av FDM.

Til hvørt einstakt bilmodell eru kort við nágreiniligum upplýsingum um konstruktiónina á bilinum, og hvørji amboð ið skulu brúkast. Alt verður gjørt eftir forskriftunum, sigur Kaj Boetius og leggur afturat, at rustviðgerð er í stóran mun ein spurningur um álit. Tað er sjáldan ov seint, men ongantíð ov tíðliga at fáa bilin rustviðgjørdan.

mg.



## Hægsta góðskustøði

**Sum einasta ISO-góðkenda bilasøla í landinum fekk P/F Ivan Johansen Bilar góðskuskipanina hjá fyritøkuni endurcertifiseraða fríggjadagin 8. desember 2006 tá umboð fyri Det Norske Veritas, saman við umboðum fyri leiðsluna hjá P/F Ivan Johansen Bilum, gjøgnumgingu góðskuskipanina hjá bilasøluni.**

# Eitt meistaraverk í praktiskari innrætting

**Tveir nýggir Citroën MPV eru komnir á marknaðin fyri kortum: C4 Grand Picasso til 7 persónar og C4 Picasso til 5 persónar. Motorjournalistar eru samdir um at báðir bilarnir eru eitt meistaraverk í rúmligheit og praktiskari innrætting**

**BILAR**




Picasso familjan hjá Citroën er vaksin frá einum til heili trý ymisk bilmodell seinastu tíðina. Tann fyrsti Xsara Picasso, ið hevur verið á marknaðinum í nøkur, verður ikki tikin av skránni, men framleiðslan heldur áfram.

Tann fyrri av teimum nýggju er Citroën C4 Grand Picasso við 7 sitiplássum, síðan kom C4 Picasso við fimm sitiplássum á marknaðin. Hesin er 12 cm styttri og hevur eitt sindur annarleiðis design aftan fyri forhurðarnar við øðrvísi baklúku, baklyktum o.s.fr.

C4 Picasso eru sermerktir við óvanliga stórum forrúti, sum gongur langt inn á takið, og smala A-stólpanum og stóru síðurútunum, sum geva gott útsýni hjá bilføraranum og verja ímóti óneyðugum blindvinklum. Hóast tann smala A-stólpan og tað framúr góða útsýni, fær C4 Picasso 5 stjørnur frá Euro N-Cap av 5 møguligum, so trygdin má sigast at vera í hásæti.

Bilarnir eru lættir at koyra og at umgangast í allar mátar. Koyrieginleikarnir eru, sum vit kunnu vænta tað av einum fronskum bili - stabilir og tryggir við komforti á høgum støði. Nógv er gjørt burtur úr undirvogninum og koyrieginleikunum, og bilarnir fáast við luftfjaðraskipan aftan.

Citroën C4 Grand Picasso og C4 Picasso fáast við tveimum bensin og tveimum dieselmotorum. Bensinmotorarnir eru: 1.8 litur við 127 hk og 2.0 litur við 143 hk. HDI turbodiesel motorarnir eru: 1.6 litur við 110 hk og 2.0 litur við 138 hk.

Bilarnir eru væl útgjørdur við øllum teimum nýggjastu trygdarskipanunum sum t.d. ESP, airbag framman, í síðunum, og gardin- og knæairbag, 3-punkt rulluselum á øllum plássum, o.m.a.

Bilarnir kunnu síggjast og roynast hjá Ivan Johansen Bilum. C4 Picasso (5 setur)kostar úr 226.000, og C4 Picasso Grand (7 setur)kostar úr 246.000.

mg.

Ivan Johansen Bilar · Mercedes-Benz · DODGE · Jeep · CITROËN · CHRYSLER · MITSUBISHI MOTORS
Hoyvíksvegur 63 · tlf. 31 36 66 · ivan@ivan.fo · www.ivan.fo